# Løgtingið sponsorerar javnstøðu í Dimmalætting

Á fundinum, sum Demokratia skipaði fyri í Miðlahúsinum hósvøldið, var málið um gjald fyri valgreinar á skránni. Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum, sum var í panelinum, fekk nakrar ákoyringar fyri hetta. Hann vísti kortini á, at hetta var gjørt til tess at sleppa undan at sortera millum valevnini, og at øll harvið sleppa framat. Hann hugleiddi eisini um, hvussu nógv valstríðið er kommersialiserað síðani aldaskiftið. Hann helt kortini, at Demokratia gongur á odda við at føra kommersielt valstríð. Demokratia fíggjar eina greinarøð í Dimmlætting, har ein journalistur skrivar positivt um javnstøðu fyri almennar pengar. Tað helt hann vera kommersialisering, sum vil nakað.


Dimmalætting
»MAMMA ARBEIÐIR HJÁ MONNUNUM«

# 13 stilla upp fyri Javnaðarflokkin í Vági

Í Vági er javnaðarfelagið liðugt við uppstillingina til kommunuvalið. Fimm kvinnur og átta menn stilla upp – teirra millum eisini borgarstjórin í Vági, Kirstin Strøm Bech

Hesi hava stilla upp á javnaðarlistanum til kommunustýrisvalið í Vági.

**Valevnini eru:**

Poul W. Augustinusen, Býráðslimur, Vágur
Evald Bech, Timburmaður, Vágur
Kristin Strøm Bech, Borgarstjóri, Vágur
Jón Gærdbo, hallarvørður, Vágur
Harriet Hjelm Joensen, Deildarleiðari, Vágur
Julius Vest Joensen, kokkur, Vágur
Bjarni Johansen, montørur, Vágur
Eydis Kjærbo, bankakvinna, Vágur
Dánjal Ludvig, linjumaður, Vágur
Eyðhild Mørk, sølufólk, Vágur
Joan Nolsøe, leiðari, Vágur
Tórður Poulsen, skrivstovumaður, Vágur
Kaj Tausen, skipsførari, Vágur

# Steinbjørn og Jórun stilla uppaftur

BÝRÁÐSVAL

- Men tað ger Rani Nolsøe ikki, býráðslimur ikki.

Norðoya Tjóðveldisfelag stillar tíggju valevni upp til býráðsvalið í Klaksvíkar kommunu. Tey eru til dystin fús at halda áfram við leiðsluni í Klaksvíkar býráð. Við Tjóðveldinum við endan í Klaksvíkar Kommunu hevur kommunan goldið skuld niður, umframt at neyðugar útbyggingar eru framdar. Við Tjóðveldinum í samgongu í Klaksvíkar býráð eru fyribils loysnirnar skiftar út við varandi loysnir.

**Hesi bjóða seg fram:**

Esmund Jacobsen, arbeiðsmaður, Klaksvík
Eyðun Jacobsen, borgarstjóri, Svínoy
Fríðrik Sivertsen, sjóðmaður/lesandi, Klaksvík
Jórun Høgnesen, lærari, Klaksvík
Karl Marius Poulsen, jarnsmiðjur, Klaksvík
Meiken Steinberg, leiðari, Klakksvík
Niclas Niclassen, bankamaður, Klaksvík
Ólavur Klakk, arbeiðsmaður, Klaksvík
Óluva Klettskarð, studentaskúlalærari, Klaksvík
Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, Klaksvík

# 11 kvinnur og ein maður á Uttanflokkalistanum í Vági

BÝRÁÐSVAL

Uttanflokkalistin í Vági hevur stillað upp til býráðsvalini í nú skjótt 50 ár, undantikið onkur val í 70 unum, og hevur altíð havt umboðan í býráðnum. Hesaferð stillar uttanflokkalistin upp við mest sum bara kvinnum. At stillað verður upp uttanflokka er tí, at hildið verður, at tað ikki hóskar seg at dríva politikk í kommununum. Til næsta val, tá ið Suðuroy kanska verður ein kommuna, verður neyvan nakar uttanflokkalisti, ella verður hann framhaldandi, spyr Uttanflokkalistin í tíðindaskrivi. **Valevnini eru:**

Eileen Sandá, skrivstovukvinna, Vágur
Lív Godtfred, bankakvinna, Vágur
Jytte Ludvig, skrivstovukvinna, Vágur
Anna Djurhuus, húsmóður, Nes, Vágur
Asta Andreasen, heilsuhjálpari, Vágur
Fríðgerð Midjord, sjúkrarøktarfrøðingur, Vágur
Betty Muller, servitrisa, Vágur
Selma við Ósagarð, skrivstovukvinna, Vágur
Olga Muller, heilsuhjálpari, Vágur
Arnbjørn Fagraklett, vinnulívsmaður, Vágur
Harriet Joensen, leiðari, Vágur
Marsanna Heinesen, húsmóður, Vágur

# Sambandslistin í Eysturkommunu

Listi B, Sambandsflokkurin, hevur stillað lista til bygdaráðsvalið tann 11. nov. 2008 í Eysturkommununi (fyrr Gøta og Leirvík). **Hann sær soleiðis út:**

1. Svenn Ó. Olsen, húsasmiður, Syðrugøta
2. Atli Hansen, fyrrv. reiðari, Norðragøta
3. Hjalti Gleðisheygg, koyrisamskipari, Syðrugøta
4. Bára Joensen, læraralesandi, Norðragøta
5. Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri, Leirvík
6. Hugo Skorastein, maskinførari, Leirvík
7. Haakon Djurhuus, maskinsmiður, Leirvík
8. Erling Jacobsen, sølumaður, Norðragøta
9. Ólavur Thomsen, lærari, Leirvík
10. Leila Olsen, heilsufrøðingur, Leirvík
11. Terje Lervig, deildarleiðari, Leirvík
12. Cristianna Joensen, dagrøktarmamma, undir Gøtueiði

# Tjóðveldislistin til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu klárur

BÝRÁÐSVAL

Tjóðveldi stillar 17 valevni upp til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu. Kvinnurnar eru fleiri í tali, enn tær hava verið áður. Tær eru nú sjey og menninir 10 á listanum. 11 av valevnunum eru nýggj á listanum, og seks hava stillað upp til býráðið fyrr, teirra millum teir fýra býráðslimirnir hjá flokkinum.

Flokkurin hevur sitið í meiriluta hetta seinasta skeiðið og fegnast um, at nógv stórmál eru loyst heilt og ávegis. Tjóðveldi ásannar samstundis, at onnur stórmál standa fyri tørni at verða raðfest í politiska arbeiðnum til gagns fyri borgarnar og kommununa.

Tjóðveldi setir trivnaðin hjá tí einstaka í hásætið. Flokkurin leggur dent á áhugamálini hjá heildini og ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk. Umráðandi er at høvuðsstaðurin gongur undan í allari menning, og flokkurin bjóðar seg fram at taka við leiðsluni í Tórshavnar kommunu.

**Valevnini eru:**

Bogi Andreassen, Leiðari
Jógvan Arge, Varaborgarstjóri
Niels Uni Dam, Internetráðgevi
Hildur Eyðunsdóttir, Býráðslimur
Marin Katrina Frýdal, Býráðslimur
Ingeborg Godtfred, Stjórnarskrivari
Petur í Gong, Vinnurekandi
Leivur Hansen, Býráðslimur
Maud Wang Hansen, Leiðari
Albert Isfeld, Arkitektur
Ísak N. Jacobsen, Kt-serfrøðingur
Katrin Joensen, Landm. teknikari
Tórur av Kák Olsen, Skrivstovumaður
Rannvá Ragnarsdóttir, Advokatur
Jákup Símun Simonsen, Bankamaður
Edith Vang, Sjúkrarøktarf.
Mads Andrias Winther, Fyrrv. rektari